*<u>skulle være en beskrivelse af bevægelser i befolkningen udvikler sig til en forestilling om, at sådan bør det være. Det deskriptive bliver normativt.</u> Sådan som folket har det og forstår sig selv, sådan skal det også være. Den intellektuelle er i denne praksis reduceret til kvalificerende talerør for folkets fornemmelser. Her er intet bud på nye mulighed eller alternative udviklingsretninger. Eller nye visioner. Som sådan er bogen symptomatisk for en demokratisk krise, som viser sig ved sin modvilje til at mobilisere og bryde holdninger. Som viser ved sin manglende evne til at afsøge og afdække nye problemstillinger og udfordre den politiske konsensus. Og netop ved sin manglede evne til at forholde sig til den demokratiske krise bliver Pittelkows bog uambitiøs og intellektuelt triviel, men samtidig så meget desto mere symptomatisk for krisens omfang. Den bliver til et fattigt og falleret forsvar for Pittelkow selv som befolkningens sande talsmand. Som en der ikke anerkender sandheder og indsigter, som er væsentligere end befolkningens fornemmelser afspejlet i meningsmålinger.*"

Tað er her gjørligt at seta Hanus inn í staði fyri Pittelkow og okkum sum hava skrivað kritiskt um nationalismuna inn sum " *modstanderne, som han hverken nævner ved navn eller citerer eller diskuterer indgående med. Han møder dem kun i sin egen fordom om deres karikerede positioner.*"



*Í mun til tað, sum vit vanliga rópa nationlistar, eru føroyingar ikki meira enn hóvligir*

Men hví vilja skilafólk sum Pittelkow og Hanus nú tosa um tjóðskaparkenslur ella "nationalfølelse" og retraditionalisera, ella endurskapa mistar siðir sum eina loysn uppá okkara mentanarligu kreppu. Her tykist tankin vera, at vit ikki sjálvi kunnu finnað málið fyri hvønn vegin mentan okkara skal mennast, so skulu vit finnað svarið í fortíðini. Hetta fær tey at herja á gamlar dogmur, so sum tær politisku hugmyndafrøðirnar, hin kristna moralin, søguliga felagsskapin, kvæði og fólkadans o.s.fr., fyri at endurvinna mentanini tess støðufesti og mistu tign. Henda leið er sjálvandi konservativ, men ovurhonds virkin í nógvum londum og ikki minst í Føroyum í dag. Sjálv tjóðskaparrørslan hevur hesa leið í síni sál.

Í Danmark er eitt spennandi kjak um tað sama sum Hanus her tekur upp. Marianne Stidsen, ið er lektari á Nordisk í Keypmannahavn tók herfyri til í Politiken:

*»Mange reagerer med angst over for udviklingen. De føler, de i globaliseringen mister deres identitet, deres ståsted. Og så trække er de sig helt tilbage og ønsker sig helt tilbage til førmoderniteten. En slags hjemstavnsnostalgi. Her mener jeg, at det moderne gennembruds tradition kan tilbyde en anden slags idenititet«*

## Tjóðarbygging?

Hanus sum hevur skriva um brandesianismu og modernaða frambrotið, dugir ikki at síggja, at eg eisini ein tjóðarbyggjari uppá ein annan máta, í og við at eg vil modernisera kjak, søguskriving og málpolitikk. At vilja geva fólkunum tól, vitan og førleika at møta modernitetinum við øðrum enn føroyskum dansi, Føroya floru og flaggdagsskrólið. Eg eri hin fyrsti sum sigur hetta, meðan nationalistar hava alt ov leingi sitið á øllum, frá málinum, søguni, samleikatosinum og samleikapolitikkinum og hava umsitið hetta illa. Tað eg sigi er eingin hóttan, tað er nationalisman ið er skomm alt árið. Eg haldi enn, at nationalisman er ein barnasjúka, ið etur fólk upp og ger tey forelskaði í egnum afturparti. Vit eru nógv, ið eru mentaði uttan at vera national (t.d. fyri loysing, men anti-nationalistisk), ið eru farin at troyta aðrar leiðir enn ta nationalu, tí hon kann valla brukast í dag í einum globaliseraðum heimi, har vandamálini og møguleikar eru uttan mark, har nationalstaturin bert er ein síða av veruleikanum.

Í 20. øld. síggi eg hópgravir, dráp, týning, deyða, sorg og at øll øldin hevur verið eitt stórt morð. Eg síggi mannavonda hugmyndafrøði, sum t.d. nationalismu, fasismu, kommunismu, ið hava kappast um at leiða fólk í ófærið, tað sum hevur haft tað torført er modernisma og frælsisleitt kulturradikalisma og eksistentialisma, serliga í Føroyum. Modernisman og eksistentialisman eru individperspektiv og hava sum upplýsingartíðin torført við at góðtaka nationalismuna (sum er eitt bólkafænomen) sum eitt galdandi argument fyri nakað sum helst. Hanus hevur ov lítið álit á modernitetinum og globaliseringini, at hann soleiðis noyðist at brúka nationalismuna fyri at varðveita eina samanhangandi heild og eitt samband við miðøldina. Ì mun til Hanus trúgvi eg ikki, at nationalisman er mátin man kann gerða hetta . Eg kundi víst, at tá hann og Pittelkow bert vilja tosa um tað sum er gott við hóligu nationalismuni, kvælir teir granskning, atfinningar, intellektuell perspektivir, ið ikki eru deskriptiv ella normativ sum teirra. Í seinasta enda dugir hann ikki at síggja, at eitt lýsandi argument brúkt normativt er skeivt.

Eg vil at enda ynskja Hanusi tillukku við stóru virðislønini og siga, at tað gleddi meg at hoyra at hann fekk hesa.